## P/f POUL MICHELSEN

### GOYMSLUSTJÓRI

Vit sóknast eftir einum ágrýtnum og røskum fólki at hava ábyrgdina og dagligu leiðsluna av okkara goymslu og útkoyring.

Starvið sum goymslustjóri inniber í høvuðsheitum at:

- Fyriskipa alt arbeiðið á goymsluni
- Gera arbeiðsætlanir fyri goymslufólkini og bilførararnar
- Hava ábyrgd av goymslufólkunum og gera lønaravtalur
- Hava ábyrgd av, at allir ordrar verða avgreiddir og gjørdir klárir til útkoyring
- Samskifta við føroyskar kundar í samband við vøruútkoyringina
- Samskifta við føroyskar veitarar í samband við vørumóttøkuna

Starvið er spennandi og skiftandi, men eisini rættiliga umfatandi og krevst tí, at umsøkjarin hevur yvirlits- og fyriskipanareginleikar. Dámar tær avbjóðingar, og sóknast tú eftir einum góðum og tryggum starvi, vilja vit fegin koma í samband við teg.

Lønin verður ásett sambært avtalu, og goymslustjórin hevur tilvísing til leiðsluna.

Vinarliga vend tær til Poul Michelsen ella Gunnar Mohr á tlf. 314650, um spurningar ella ivamál eru.

Skrivlig umsókn kann sendast til:
P/f Poul Michelsen, Postrúm 200, FO-110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 25. februar, og ætlanin er, at tú byrjar skjótast gjørligt.

**P/f Poul Michelsen**

*P/f Poul Michelsen ella bara PM, sum heilsølan ofta verður nevnd millum manna, varð stovnað í 1974. PM er í dag førandi heilsøla innan sítt virkisøki og hevur kundar kring alt landið. Virksemið er í støðugum vøkstri, og tí verður vørumóttøku- og vøruútkoyringsparturin av goymslubygninginum í løtuni bygdur út. Ætlanin er eisini í næstum at byggja goymsluna meira út. PM er skipað í 5 deildir: Sølu-, innkeyps-, fíggjar-, goymslu- og útkoyringsdeild. Á goymsluni og í útkoyringini starvast íalt 15 fólk. Hjá PM starvast íalt 50 fólk.*

# GRAMEX

## Útgjalding úr Gramex-grunninum

Heitt verður á øll, ið framleiða føroyskar fløgur og bond, um at senda skjalprógvað tilfar um, hvussu nógvar eindir hvør einstakur framleiðari ella virki hevur framleitt í tíðarskeiðnum 01.01.2005 til 31.12.2005.

Allar eindirnar verða síðani taldar saman í stigum, ið so verða nýtt, tá samlaða upphæddin frá GRAMEX skal býtast.

Sjálv útgjaldingin verður í mars 2006.

Alt tilfar skal sendast til:

**Framleiðslufelagið • Postboks 1057 • FO-110 Tórshavn**

**Minnist til hesar váttanir:**
1. Váttan um framleiddar eindir
2. Avrit av faktura
3. Váttan frá studio um tal av eindum ella tvítøkum
4. Eitt eintak av verkinum

**Eru ivamál, so set teg í samband við:**
Gissur Patursson
Tel 353532 / 213535
Fax 353536
gissurpatursson@hotmail.com

**Seinasta freist fyri innlating er 28. februar 2006**

SANSIR.FO

# VEKINGAR-MØTIR



í Kelduni 7.-10. mars

| | |
|---|---|
| Týskvøld | kl. 18.30 |
| Mikukvøld | kl. 19.30 |
| Hóskvøld | kl. 19.30 |
| Fríggjakvøld | kl. 19.30 |

*Rodney & Adonica Howard Brown*

EVANGELISKA SAMTAKIÐ
**KARISMA**
& REVIVAL MINISTRIES INTERNATIONAL

**Øll eru hjartaliga vælkomin**




REPROZ

Í sambandi við at nýggja barnaverndarlógin kemur í gildi tann 1. jan. 2006, verður søkt eftir fosturfamiljum kring alt landið.

Vit søkja bæði eftir fosturfamiljum, ið kunnu hava børn til umlætting og fosturfamiljum, sum kunnu vera bráðfeingis fosturheim, fyribils fosturheim og varandi fosturheim.

FØRLEIKAKRØV

Fyri at kunna góðkennast sum fosturforeldur krevst:

- Rein revsiváttan
- Læknaváttan um heilsustøðu
- Góðar bústaðarumstøður
- Fíggjarligu viðurskiftini eru í lagi
- Neyðug umsorganarevni og foreldraførleiki
- Møguligar royndir sum uppalarar

SETANARVIÐURSKIFTI

Avtala verður gjørd við Barnaverndarstovu Føroya og avvarandi Barnaverndarnevnd um:

- Tíðarætlan
- Samsýning
- Samverurættin hjá foreldrum og øðrum
- Stuðul, vegleiðing og luttøku í undirvísing

Samsýningin verður sambært kunngerð nr. 3 frá 3. mars 2004 frá Almanna- og Heilsumálaráðnum um samsýning til fosturforeldur.

UMSÓKN

Umsókn saman við reinari revsiváttan, læknaváttan um heilsustøðu og avrit av prógvum verður at senda til:

Barnaverndarstovu Føroya
R.C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 28. februar 2006